Álit

í

løgtingsmáli nr. 85/2023: Uppskot til løgtingslóg um føroyskt sum annaðmál

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2024 og eftir 1. viðgerð 20. mars 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars og 3. og 10. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Elisabeth Holm, undirvísara í føroyskum sum annaðmál, Majken Súsannu Gaard, undirvísara í føroyskum sum annaðmál, Lív Næs, leiðara á Tvøroyrar kvøld- og ungdómsskúla, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Undirvísingarstýrinum.

Nevndin heldur tað verða skilagott at fara undir tilgongdina at skipa økið føroyskt sum annaðmál.

Tað gerst alsamt eyðsýndari, at tørvurin á skipaðum viðurskiftum økist, við at fleiri tilflytarar koma til Føroya. Seinastu árini er talið av tilflytarum úr serliga Eysturevropa og Asia vaksið nógv og skjótt. Seinastu tíggju árini er talið av tilflytarum til Føroya, har føðilandið annahvørt er Evropa uttanfyri Norðurlond ella Asia, vaksið við næstan 2.000 fólkum. Talan er fyrst og fremst um fólk í arbeiðsførum aldri, men fleiri teirra eru eisini børn og ung.

Undirvísing í føroyskum sum annaðmál hevur ligið hjá kommununum og hevur verið skipað í kvøldskúlum, men nú hava fleiri teirra boðað frá, at tað er blivið ov stórt og tungt hjá kvøldskúlum at taka sær av. Eitt nú sóu vit herfyri, at Tórshavnar Kvøldskúli valdi at gevast við undirvísingini, tí tað var blivið ov tungt, og tí tey høvdu ikki neyðuga tilfeingið at reka hetta á besta hátt.

Tí er tað í tøkum tíma, at økið verður skipað undir landinum.

Undirvísingarstýrið skal skipa undirvísingina saman við samstarvsskúlum, sum sambært serligu viðmerkingunum til § 3 í stóran mun verða miðnámsskúlar. Samstarvsskúlarnir seta lærararnar og hava ábyrgdina av undirvísingini. Undirvísing skal standa øllum tilflytarum í boði, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum og eru omanfyri fólkaskúlaaldur. Talan er um eitt tilboð og ikki eitt krav, og undirvísingin kann enda við prógvtøku, men heldur ikki tað er eitt krav.

Allir tilflytarar skulu fáa tilboð um undirvísing, og sambært § 3 í lógini og serligu viðmerkingunum til hesa grein skal øllum, sum taka av tilboðnum, verða tryggjað møguleika at kunna møta til undirvísing, um undirvísingarstaðið til dømis er í aðrari bygd enn har, bústaðurin er.

Hóast umsitingin og ábyrgdin fer at liggja hjá samstarvsskúlunum, kunnu hesir syrgja so fyri, at skipað verður fyri undirvísing á øðrum stað enn í einum ávísum skúla.

Hesar ásetingar hava týdning, tí tað skal gerast so ómakaleyst sum gjørligt at kunna møta til undirvísing.

Nærri ásetingar skulu gerast um innihaldið í útbúgvingini og undirvísingini og til førleikakrøvini til lærarar, sum skulu undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

Undir fíggjarligum avleiðingum í uppskotinum er upplýst, at 5,6 mió. kr. eru settar av í 2024 til føroyskt sum annaðmál, men at verður henda lógin samtykt, økist tørvurin á játtan til umleið 7 mió. kr.

Hetta er millum annað tí, at tað verður mett, at tørvur verður á 8,5 ársverkum, harav 7 eru til undirvísing og hálvtannað til leiðslu, umsiting v.m.

Um hetta er nóg mikið, er tó óvist, tí upphæddin er knýtt at tilflytarum til Føroya, og um tað møguliga gerst eitt krav, at útlendingar fáa undirvísing í føroyskum, tí so økist sannlíkt talið av næmingum.

Samanumtikið heldur nevndin, at hetta uppskotið er eitt neyðugt stig at taka fyri at skipa økið betur og at tryggja, at útlendingar, sum koma til Føroya, fáa frálæru í føroyskum, sum er avgerandi fyri integratiónina og trivnaðin hjá fólki, sum koma fremmand til eitt annað land. Tað er eisini ein fortreyt fyri, at tey kunnu gerast so produktivir og luttakandi samfelagsborgarar sum gjørligt.

Undir nevndarviðgerðini er tó týðiliga komið fram, at hetta er eitt øki, sum ikki hevur fingið nóg høga raðfesting í fleiri ár, og ført hevur fleiri ferðir verið fram, at hetta uppskotið átti at havt verið ein partur av einum størri átaki innan økið við eini heildarætlan sum grundarlagi.

Tað eru fleiri leysir endar, sum longu áttu at verið greiddir.

Eitt nú verður í serligu viðmerkingum til § 8 um námsætlan sagt, at undirvísingin í føroyskum sum annaðmál skal fylgja námsætlanini FSA (Føroyskt sum annaðmál), sum er frá 2020. Í innganginum til námsætlanina stendur, at hon ”*verður sett í verk sum ein royndarskipan í tvey skúlaár og verður eftirmett á vári 2022*”. Nú eru vit á vári í 2024, og framvegis er eftirmetingin ikki liðug. Nevndin heldur tað vera avgerandi, at tann eftirmetingin verður liðug so skjótt sum gjørligt, so tað er tryggjað, at undirvísingartilfarið livir upp til øll neyðug krøv og grundleggjandi er á nóg góðum støði.

Tað verður eisini arbeitt við eini nýggjari integratiónslóg, sum eftir ætlan skal leggjast fram í næstu tingsetu. Frálæra í føroyskum máli og mentanarfatan er sannlíkt ein týdningarmikil partur av integratiónslógini. Tí átti arbeiðið við hesum uppskoti í tann mun tað ber til at verið samskipað við arbeiðinum við integratiónslógini, so vit ikki standa í støðuni um stutta tíð, at møguliga skula broyta hesa lógina aftur, um integratónslógin setur onnur krøv enn hendan lógin.

Harafturat skuldi verið gjørt meira fyri at framtíðartryggja økið. Sum er, kann tað síggja eitt sindur tilvildarligt út hvat hendir, og tað manglar ein samskipan millum allar áhugapartar.

Til dømis er í kunngerð skipað fyri undirvísing í føroyskum sum annaðmál í fólkaskúlanum, men einki tilsvarandi er fyri næmingar í miðnámsskúlaaldri.

Á miðnámsskúlastøði er eisini ein avbjóðing, at nógv av tilfarinum er á donskum, sum aftur er eitt triðja mál, sum útlendingar mugu læra, skulu teir koma ígjøgnum miðnámsskúlan. Upplýst er fyri nevndini, at umleið 80% av tilfarinum, sum verður brúkt á miðnámsskúlastøði, er á donskum. Av tí sama er tað helst skilagott í ein ávísan mun, at í § 2 er latið upp fyri, at undirvísing í til dømis donskum eisini kann skipast, men vit áttu sjálvandi at syrgt fyri, at alt undirvísingartilfarið í føroyskum skúlum verður á føroyskum. Tilfar á donskum verður eisini brúkt í fólkaskúlanum, men í nógv minni mun enn í miðnámsskúlum.

Ein heildarætlan skuldi verið gjørd fyri økið, so vit tryggja okkum, at vit røkka tilflytarum í øllum aldursbólkum á ein nøktandi hátt.

Tjúgu fólk hava fyri stuttum fingið útbúgving sum lærarar í føroyskum sum annaðmál, men síðan tá er útbúgvingin ikki boðin út aftur, og Fróðskaparsetrið hevur ikki játtan til ein nýggjan flokk. Hetta skuldi langt síðan verið skipað í fastar karmar, so vit ikki eru í vanda fyri at mangla skikkaði fólk at undirvísa.

Tað skilst, at ætlanin er, at útbúgvingin skal bjóðast út aftur, men enn er ógreitt í hvønn mun og hvør tíðarætlanin er.

Harafturat manglar nógv gransking á økinum, sum eisini verður víst á í hoyringarsvari. Uttan kanningar og gransking manglar vitan. Uttan vitan er okkum ikki greitt um vit arbeiða á besta hátt og eftir bestu fortreytum. Vit eiga at vera framskygd og seta gransking á økinum í ein fastan karm.

Nevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur at fara undir eina skipaða tilgongd at fáa alt økið dagført og tryggja ein samanhang og góðsku á økinum føroyskt sum annaðmál, nú økið alt verður skipað undir landinum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 2. mai 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	